

# Føroyingar tóku hjartaliga ímóti Logos Hope

**Logos Hope, sum er gamla Norrøna, kom á Havnina seinnapartin fríggjadagin og hundraðtals fólk við løgmanni og borgarstjóranum í Havn á odda, vóru og tóku ímóti**

TRÚBOÐARASKIP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Tað var hátíðarløta á Vestaru Bryggju í Havn seinnapartin fríggjadagin, tá ið trúboðaraskipið, Logos Hope, legði at bryggju fyri fyrstu ferð, eftir at skipið, sum jú er gamla Norrøna, er umvæld og umbygd fyri langt yvir 200 milliónir krónur.

Eftir eitt hátíðarhald á bryggjuni, við røðum, horntónleiki og sangi, var øll mannfjøldin boðin umborð at síggja skipið.

Og tað nyttar lítið at hava verið fastur gestur umborð á gomlu Norrønu fyri at finna runt umborð á Logos Hope, tí skipið rætt og slætt ikki til at kenna aftur.

Tað mesta skrætt innan úr skipinum, heilt inn á stál og allar installatiónir eru lagdar av nýggjum og alt er nýtt innan og fullkomiliga broytt.

Tað einasta, vit kenna aftur, eru sjálvar trappugongirnar, sum eru tær somu.

Manningin á Logos telur yvir 300 fólk úr einum 45 tjóðum úr øllum heiminum. Tey eru í øllum aldri og tað er heldur ikki óvanligt, at heil húski.

Tí er eisini hugsað um alt umborð og Logos Hope er eitt vælvirkandi, fullfíggjað samfelag í samfelagnum við skúla, sjúkrahúsi, tannlækna, biografi, sjónleikarahúsi, matstovu, fundarhølum og øllum øðrum, sum annars krevst.

Serliga errin eru tey av bókahandlinum, sum er heimsins størsti flótandi bókahandil og har bøkur fáast um alt møguligt, ikki bara andaligar bøkur. Tey hava yvir 6000 tittlar í bókahandlinum og tildsamans 1,3 kilometur av bókahyllum.

Logos Hope fer til Klaksvíkar hósdagin, har hon liggur til seint sunnukvøldið, tá ið tey stevna úr aftur Føroyum á rundferð í Stóra Bretlandi, áðrenn leiðin gongur til Karibia, har tey fara at sigla runt í eitt gott ár undir herrópinum, vitan, hjálp og vón.

Vit hava verið umborð á Logos Hope, har myndamaður okkara, Jens Kristian Vang tók hesar myndirnar á móttøkuni á bryggjuni og umborð á sjálvum skipinum.



*Tað var hátíðarløta á Vestaru Bryggju, tá ið Logos Hope legði at bryggju og hesar báðar fínu óvitagenturnar høvdu blómutyssi við*